

## Handverkarir

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrki.

demich **Ring á tlf. 21 10 71**



## Summarferiu-avloysari

Føroya Shell søkir eftir feriuavloysara summarið 2002 til bókhaldsdeildina á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

Arbeiðið fevnir um avgreiðslu av viðskiftafólki og annað fyrisitingararbeiði. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 347400 lokal 413.

Umsókn merkt »avloysari« skal sendast til

Shell
**P/F Føroya Shell**
Postboks 188
110 Tórshavn

og má vera okkum í hendi innan 1. mai 2002.



## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í 1/2 tíð hjá Tórshavnar havn.

**Arbeiðsuppgávur:**
Útrokning av vørugjaldi
Journalisering (DocuLive)
Telefonavgreiðsla
Skrivligt samskifti
Annað skrivstovuarbeiði

**Setanarviðurskiftir:**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge tlf. 31 17 62

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu vera Tórshavnar havn, Postboks 103, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 30. apríl 2001.

**Tórshavnar havn**



**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo



## Lærlingur til fotodeildina

Vit sóknast eftir einum lærlingi til fotodeild okkara at byrja sum skjótast. Tú kemur m.a. at arbeiða á okkara nútímans foto-laboratorii og taka tær av alskyns uppgávum innan foto og ta spennandi nýggju "digitalu" verðina.



Hevur tú kunnleika til fotoarbeiði og telduførleika, er tað ein fyrimunur.
Lærutíðin er 3 ár og ein treyt er, at tú hevur FHS-prógv el. líkn. Í lærutíðini verður tú send/ur niður á 14 daga skeið/skúla 2-3 ferðir; og annars upplærd/ur av serfrøðingum innan foto, ið 3-arin hevur vitjan av av og á. Tú kemur at starvast saman við einum ungum dynamiskum liði. Umframt fotodeildina hevur 3-arin eina fløgudeild, eina tøknideild og eina deild við prýðislutum. Tilsamans starvast uml. 12 fólk í 3-aranum, undir leiðslu av okkara stjóra Høgna Zachariasen.

Vilt tú hava meiri at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Gissur, tel 353534.

Skrivlig umsókn verur at senda sum skjótast til:

3arin

*att. Gissur Patursson*
*SMS · Postboks 1057 · FO-110 Tórshavn*



## Krambafólk til bakaran í SMS

**Bakarin í SMS sóknast eftir fólki til sølubúðina at byrja skjótast tilber.**

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn til okkum. Tú kanst eisini seta teg í samband við Eirikk, tel 31 30 46, um tú vilt hava meira at vita um starvið.

Bakarin í SMS
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn
Tel 31 30 46



## Lastvognsførari

Søkt verður eftir royndum lastvognsførara at byrja beinavegin.

**Sp/f J. K. H. Entreprenør**
tlf. 227255



## Postverk Føroya

## Frítíðaravloysarar

**Posthúsið og Girostovan í Tórshavn søkja við hesum eftir frítíðaravloysarum m/k til**

- **Postútbering –**
  – arbeiðið byrjar klokkan 06.00
- **Postskiljing**
  – vaktarskifti millum klokkan 04.00 og 22.00
- **Postkoyring**
  – vaktarskifti millum klokkan 05.30 og 21.00
  – stóra koyrikortið er ein fyrimunur/treyt
- **Skrivstovuarbeiði**
  – vaktarskifti millum klokkan 08.00 og 19.00

***Roknast kann við at arbeiðið verður í tíðini 1. mai – 30. september. Talan kann eisini verða um styttri tíðarskeið.***

Postverkið ynskir av tær, at tú ert álítandi, ágrítin, stundislig/ur og positiv/ur. Lønin verður eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag. Hevur hetta tín áhuga, so send skjótast gjørligt og í seinasta lagi 23. apríl skrivliga umsókn við møguligum prógvum/viðmælum til:

**Postverk Føroya**
Postboks 3009
110 Tórshavn



## Eysturoyar Teoriskúli

**Um nóg nógv tekna seg, verður endurtøkuskei 19. og 20. apríl**
**Endalig roynd verður 29. apríl**
**Johan Beder, tel. 210 821**
**Ole Lykke, tel. 220 972**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**

Sosialurin - 311820



Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN
Gerið góðar tíðir betri
Stig fyri stig



LASSE KLEIN
www.lasseklein.com




## Politiskt orðaskifti

Pallborðsorðaskifti við umboðum úr teimum politisku flokkunum verður fyri fakfelagsnevndum um alt landi á Hotel Føroyum

**mánakvøldið 15. apríl 2002 kl. 19.00.**

Tey mál, sum vit ætla at viðgerða eru m.a.:

- **Vanlukkutryggingarlógin**
- **Dagpeningalógin**
- **Uppsagnarfreistir** hjá teimum tímaløntu í mun til fólk sum eru fevnd av starvsmannalógini,
- **Starvsaldur** hjá teimum, sum starvast á virkjum, sum skifta eigara
- **Rættindi hjá føroysku løntakarunum** í mun til løntakarar í grannalondum okkara (t.d. lógin um hópuppsagnir, lógin um skyldu arbeiðsgevaranna at boða løntakarum frá um setanatreytir teirra)
- **Lóg um prísansing**

***Umboðini fyri politisku flokkarnar verða:***

Tjóðveldisflokkurin
*Páll á Reynatúgvu, Finnur Helmsdal,*
Javnaðarflokkurin
*Hans Pauli Strøm, Joan Ziskason*
Miðflokkurin
*Álvur Kirke, Dánjal Petersen*
Sambandsflokkurin
*Alfred Olsen + eitt umboð*
Sjálvstýrisflokkurin
*2 umboð*
Fólkaflokkurin
*2 umboð*

Orðstýrari: *Helgi Jacobsen*

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðsmannafelag**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**




12. mai kl. 15.00 í Ítrottarparkini

# FCK - Brøndby

**Úr Føroyum 9. mai kl. 20.40**
**Aftur til Føroya 13. mai kl. 08.55**

**Prísur: kr. 1.995,-**
við í prísinum er atgongumerki, rundtúr við Toda í Parkini og ferðaavgjald.
Avmarkað nøgd.

**ROCKSHOW 2002**
EYEQ, DEN GALE POSE, TV2
COWGIRLS, SAYBIA
FCK og RockShow skipa fyri konsert í Fælledparken í Keypmannahavn11. mai.
**Les meira á www.fck.dk**

Sosialurin
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo


**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

## Stuðulsfólk

**Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.**
**Sum stuðul fært tú eitt fjølbroytt starv. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Almannastovuna, við regluligum fundum í mun til arbeiðið.**

Arbeiðið fevnir m.a. um:
- Fylgjarauppgávur
- Stimbran
- Familjuráðgeving
- Umlætting

**Størvini eru hesi:**

### Í Eysturoy

1) – at stuðla og hjálpa einum 6 ára gomlum drongi í samskiftinum við onnur børn. Stimbra honum við venjing og spæli, einsamøllum og saman við øðrum. Arbeiðið hjá stuðlinum verður í Kongshavnar Barnagarði og í heiminum. Tímatalið er 40 tímar um vikuna fyribils til 15. juli 2003. Tað er eisini møguleiki hjá tveimum fólkum at arbeiða 20 tímar um vikuna í part.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.

2) – at menna eitt tvey ára gamalt barn sosialt og vera við til at geva barninum umsorgan. Arbeiðið hjá stuðlinum verður í Kongshavnar Vøggustovu. Tímatalið er 30 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils til 1. mai 2003.

3) – at stuðla og stimbra einum 8 ára gomlum barni á allan hátt. Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til Tilhaldi í Rók í Saltnesi. Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils til 30. juni 2003.

4) – at stuðla og menna einari 16 ára gamlari gentu. Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni og er tímatalið 20 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils til 30. juni 2003.

### Í Norðoyggjum

5) – at stuðla einum manni í gerandisligum uppgávum og hjálpa honum at skipa dagin. Tímatalið er 10 tímar um vikuna, við møguleika fyri at hakka tímatali. Játtanin er fyribils til 1. desember 2002.

### Í Tórshavn

6) – søkt verður eftir pleygufamilju til unga mammu við einum barni. Arbeiðið fevnir um at virka fyri einum tryggum og mennandi umhvørvi, eins og stuðla mammuni og barninum. Játtanin er fyribils í eitt ár.

7) – at stuðla eini kvinnu við gerandisligum uppgávum. Tímatalið er 10 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils til 1. desember 2002.

8) – at hjálpa einum ungum manni við at skipa dagin og stuðla honum í gerandisligum uppgávum. Tímatalið er 10 tímar um vikuna, við møguleika fyri at hakka tímatali. Játtanin er fyribils til 1. desember 2002.

9) – at stuðla og hjálpa eini 12 ára gamlari rørslutarnaðari gentu. Tímatalið er 35 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin er 1 1/2 tími um morgunin áðrenn skúlatíð hjá gentuni og hinir tímarnir aftaná skúlatíð.

10) – søkt verður eftir avloysara fyri stuðul í barnsburðarfarloyvi. Til 5 ára gamla rørslubrekaða gentu. Arbeiðið hjá stuðlinum er í heiminum hjá barninum, í neyvum samstarvið við familjuna og aðrar stuðlar. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna og er skiftandi seinnapartar, nátt og eitt samdøgur annan hvønn mánaða. Játtanin er fyribils til 31. august 2002.

11) – at stuðla og menna eini 8 ára gamlari gentu við spæli og venjingum og fara við henni til ymisk tiltøk. Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni. Tímatalið er 20 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils til 31. august 2002.

12) – at stuðla og hjálpa einari ungari rørslutarnaðari gentu og fara við henni til ymiskt aftaná skúlatíð. Tímatalið er 30 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils til 1. desember 2002.

### Í Suðuroy

13) – at verða stuðul hjá einum 59 ára gomlum rørslutarnaðum manni og fara við honum til ymisk tiltøk. Tímatalið er 10 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils í tríggjar mánaðar við møguligari leingjan og hækkan av tímatali.

### Í Sandoy

14) – at stuðla og menna einum 4 ára gomlum dreingi við venjingum og spæli, einsamøllum og saman við øðrum. Arbeiðið hjá stuðlinum verður fyrrapart saman við øðrum børnum og stuðlum og seinnapart í Dagrøktini. Tímatalið er 40 tímar um vikuna. Játtanin er fyribils 30. juni 2003.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Sigrun Bærentsen, Ragnhild Dahl og Karin á Heygum á tlf. 315480 í tíðini kl. 9.00 – 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skula verða Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. apríl 2002.

**Í umsókníni skal vera tilskilað uppgávu nummar.**